

# Malan skal marknaðarføra landgrunnin til oljuleiting

Deil:



**Jan Müller**

20.08.2014 - 17:56

Oljan.fo

Herfyri legði Johan Dahl, landsstýrismaður í oljumálum uppskot fyri tingið um marknaðarføring av føroyska landgrunninum til oljuleiting. Tað var samtykt at brúka 1,6 mill. kr. komandi trý árini av førleikapeningum, sum italska oljufelagið ENI hevði latið og sum vóru óbrúktar.

Herfyri lýsti Jarðfeingi eftir fólki til m.a. at marknaðarføra føroyska landgrunnin til oljuleiting.

Nú er avgjørt at seta kvinnuliga jarðfrøðingin Malan Ellefsen í starv og verður hon serstakliga at taka sær av marknaðarføringini tvs. at rudda slóð fyri, at altjóða oljufeløg fara at vísa áhuga fyri at leita eftir olju og gassi í føroysku undirgrundini.

Malan Ellefsen er útbúgvin jarðfrøðingur og hevur royndir frá m.ø. oljuvinnuni og frá almennari oljufyrisiting. Hon er í løtuni eisini við at útbúgva seg innan marknaðarføring.